

# Oljuprísurin kavar - er lækkaður við meir enn tveimum dollarum fatið í dag

**Jógvan Hugo Gardar**

19.05.2015 - 21:25

Oljan.fo

Oljuprísurin hevur síðani í gjár kava, er lækkaður við fleiri dollarum fyri fatið. Bara í dag er lækkingin meir enn tveir dollarar.

Í dag fór Norðsjóðaroljan Brent undir 65 dollarar fyri fatið, og í kvøld lækkar prísurin framhaldandi. Í løtuni liggur prísurin um 64,20 dollarar fyri fatið. Tað eru meir enn tveir dollarar lægri enn tá oljumarknaðurin lat upp í morgun.

Amerikanska lættoljan, WTI, lækkar enn skjótari. Í morgun kostaðið eitt fat av WTI 60, 31 dollarar fyri fatið. í kvøld kostar eitt fat av WTI 58,06 dollarar. Við øðrum orðum er lættoljan 2,25 dollarar bíligari í kvøld enn í morgun.